HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Útgáva 4
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing
## Matstovur, kaffistovur, kafèir o.l.

**Endamál:**
Virkan av dagsins rætti, smærri heitum og køldum rættum, køkum, kaffi, te og øðrum drekkivørum.

**Hølir:**
- Vørumóttøka.
- Goymsla til turrvørur, køli- og frystivørur.
- Køkur ella køksumráði, atskilt frá viðskiftafólki við diski e.l.
- Uppvaskirúm ella -stað.
- Goymslurúm ella stað til borðbúnað.
- Skiftirúm og vesir til starvsfólk.
- Matstað til starvsfólk
- Rúm ella bingja til burturkast.
- Stað til returvørur.
- Rúm, við skolivaski, til reingerðaramboð og reingerðarevni
- Borðstova til viðskiftafólk.
- Vesi til viðskiftafólk.

**Innrætting:**
Støddin á hølunum skal svara til vøruútboðið (slag og nøgd), og hølini skulu plaserast hóskandi, hvørt í mun til annað.
**Vegleiðing til innrætting**
- Vørumóttøka við plássi til útpakking og goymslu av returtilfari.
- Goymslurúm til turrvørur. Frysti- og køligoymsla. Frysti-og køligoymslur kunnu eisini vera í rúmi fyri seg ella í køkinum, um vøruútboðið er lítið.
- Køkur/køksumráði við arbeiðsvaski skal vera nóg stórt og soleiðis innrættað, at pláss er fyri at virka tey ymisku matsløgini, uttan at vandi er fyri krossdálka
- Neyðugt borðpláss, hillar, skáp, ovnar, hitaplátur og onnur hitatól til viðgerð av mati.
- Uppvaskieindin skal vera minst eitt vask við heitum og køldum vatni, um neyðugt skal uppvaskimaskina vera, sum vaskar við 85° C. Ella eitt longri vaskiprogram við 65 °C
- Nóg mikið av pannum, grýtum, tongum, sleivum og øðrum smálutum til viðgerð av mati.
- Tað skal ikki verða atgongd til køk ella viðgerðarrúm beinleiðis útifrá, ella úr øðrum rúmum, sum kunnu elva til dálkan, so sum goymslur, vørumóttøkur e.l.
- Uppvaskirúm/-stað atskilt frá matframleiðslu.
- Goymslurúm ella stað til reinan borðbúnað soleiðis, at hesin ikki dálkast av matframleiðsluni ella øðrum.
- Vesi, við forrúmi. Hondvask skal verða á vesinum ella í forrúminum.
- Skiftirúm kann verða í forrúminum, um umstøðurnar eru til tess. Plaseringin skal verða soleiðis, at arbeiðsfólk ikki fer ígjøgnum matframleiðslurúm ella onnur "rein" rúm í egnum klæðum/yvirklæðum.
- Matstað til starvsfólk burtur frá matframleiðslu. Um starvsfólkunum er loyvt at roykja, skal hetta vera í rúmi fyri seg.
- Eitt ávíst stað til returvørur, so hesar ikki koma í samband við reinar vørur.
- Eitt rúm ella hóskandi stað, atskilt frá matvørum, til reingerðaramboð og reingerðarevni. Eitt skolivask til spillivatn frá reingerðini.
- Vesi og borðstova til viðskiftafólk skal plaserast soleiðis, at viðskiftafólk ikki á nakran hátt koma í samband við matframleiðslu, ella onnur rúm, sum hava samband við framleiðsluna.

**Útbúnaður:**
- Hondvask í køkinum við heitum og køldum vatni. Kranin skal ikki vera hondstýrdur.
- Flótandi sápa og eingangshandklæði við øll hondvøsk.
- Neyðugar køli- og frystiskipanir við sjónligum hitamátara í køksumráðnum.
- Oskápa við fitifiltrum og nóg høgum luftskifti omanfyri ovnar, komfýrar og onnur hitatól til matgerð.

**Reingerð:**
- Allur útbúnaður og amboð skulu gerast rein eftir tørvi, tó minst eina ferð hvønn arbeiðsdag.

- Nóg mikið av ruskíløtum.
- Allur leysur útbúnaður, amboð o.a. skal hanga ella standa upp frá gólvinum á hóskandi hillum e.l., eisini reingerðaramboð.
- Bjálvast skal rundan um ljós í rúmum, har viðgerð av mati fer fram.
- Toygardinur, forhang o.l. skulu ikki vera í rúmum, har viðgerð av mati fer fram.

**Tilfar:**

- Veggir, gólv, loft, hurðar og vindeygakarmar skulu vera úr hørðum, sløttum, ljósum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.
- Allur útbúnaður skal vera úr hørðum og sløttum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.
- 

**Burturkastskipan:**

- Burturkast skal beinast út úr framleiðsluhølunum minst eina ferð dagliga og beinast burtur á ein fullgóðan hátt, samsvarandi kommulalu skipanini (KOB/IRF).
- Afturlatið rúm/bingja skal vera til burturkastið.
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast / vaskast.

- Skrivlig reingerðarætlan skal vera og henda skal fylgjast.
- Reingerðarætlanin skal innihalda arbeiðsgongd til dagliga reingerð, og nær meiri umfatandi reingerð og sóttreinsing skal fara fram.

**Persónligt reinføri:**

- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.

**Annað:**

- Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at liðugvøran ikki verður dálkað av rávøruni ella nærumhvørvinum.
- Royking er bannað á øllum støðum, har matur verður viðgjørdur ella goymdur.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting av matstovum, kaffistovum, kaféum o.l.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.